# Alitíðindi

**Fiskaaling p/f 430 Hvalvík**

**NR 3 - 1996**

# HAGTØL

## Vitjan á alistøðum.

Andrias Reinert

### Inngangur.

Í juli og august 1991 var eitt fólk frá Fiskaaling p/f á fyrsta sinni og vitjaði alistøðirnar í Føroyum við spurnarbløðum, sum vórðu gjørd saman við Fiskivinnustovuni í Tinganesi.

Ætlanin var tá, at hetta skuldi gerast á hvørjum ári, men av ymiskum orsøkum kom stígur í. Bert í 1993 varð vitjað aftur á støðunum við spurnarbløðum.

Føroya Landsstýri hevur nú tikið stig til, at savnað verður inn tilfar um alivinnuna regluliga fyri betur at verðaført fyri at fylgja við gongdini í hesi vinnu sum heild. Í januar 1996 varð vitjað á smoltstøðunum.

Endamálið við at vitja alistøðirnar regluliga er fyrst og fremst at fáa til vega álítandi hagtøl, soleiðis at tað eitt nú ber til at gera neyvari "stovnsmetingar" av hvørjum árgangi av alifiski.

Í hesi grein er nakað av tilfari frá spurnarbløðunum frá 1991, 93 og 96 sett saman. Umframt er okkurt annað tikið við, m.a. tilfar sum er fingið til vega til Árbók fyri Føroyar 1996.

### Aliøkir.

Alistøðirnar í Føroyum eru í hesum sambandi býttar upp í 5 "aliøki" (Mynd 1 á síðu 15).

Væl avmarkaði aliøki fyri seg eru "Norðuroyar" og somuleiðis "Suðuroy". Eystara síða á Eysturoy, íroknað Skálafjørðin, verður roknað sum eitt øki undir heitinum "Eysturoy E.", og markið vestureftir er linja úr Raktanga í Stongina. "Miðøkið" er Sundini, Kollafjørður, Tangafjørður, Kalbaksfjørður og Nólsoyarfjørður. Vestursíðan á Streymoy verður saman við Vágoy roknað sum aliøki "Vestanfyri".

Í talvunum niðanfyri eru aliloyvini flokkaði eftir hesum økjum.

## Aling av smolti.

Í 1983 lótu tvær tær fyrstu smoltstøðirnar (umframt Fiskaaling p/f) síl og laksasmolt til alarar. Í 1989 vóru 20 smoltstøðir í Føroyum, og pr. 31.12.1995 eru 19 smoltstøðir í drift (Talva 1 á síðu 3 og 4).

Hvør støðin hevur loyvi at ala upp til 700.000 laksasmolt og/ella sjóbúgvin síl um árið. Tvey loyvi á SEV byrgingum eru tó avmarkaði til 500.000 fiskar um árið. Smoltloyvini eru galdandi í 18 ár frá tí degi, tey eru útskrivaði.

Aling í kørum á vanligum smoltstøðum

Sum sæst í Talvu 2 á síðu 5 eru smoltstøðirnar sera ójavnar til støddar. Onkur støð elur bert 60-70.000 smolt um árið, meðan tær størstu, serstakliga nú tað ber til at koyra smolt á sjógv alt árið, hava alt upp ímóti tí sum loyvi er til.

Avgerandi fyri, hvussu nógv tað ber til at ala á eini vanligari smoltstøð, er í fyrstu syftu, hvussu nógv vatn rennur í áunum, sum støðin fær vatn úr, í ringasta turki. Sannroynd er tó, at flestu smoltstøðirnar hava roynt at alt meira fisk, enn tær í grundini hava vatn til, tá turkur er.

Í Talvu 2 (síða 5) er út fyri hvørjari smoltstøð sett tal fyri, hvussu nógvar $m^3$ av karrúmd hvør støðin hevur at ala í pr. 31.12.1995. Samlaða rúmdin til vatn í alikørunum á teimum 16 vanligu smoltstøðunum var 13573 $m^3$. Umframt hetta fer smoltaling eisini fram í nótum á nøkrum av byrgingunum hjá SEV. (sí seinni)

**Talva 1a**. Aliloyvi í "Norðoyum" 31.12.1995.

| | Aling av smolti | | Aling á sjónum | |
|---|---|---|---|---|
| | Tal | $m^3$ kør | Tal | $m^2$ |
| Staður: | | | | |
| Viðareiði | 1 | 1807 | | |
| Hvannasund N. | | | 1 | 3000 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Hvannasund S. | 1 | 1186 | 1 | 3000 |
| Svínoy | 1 | 1016 | | |
| Haraldsund S. | | | 1 | 3000 |
| Borðoyarvík | | | 1 | 3000 |
| Árnafjørður | | | 1 | 3000 |
| Norðoyar | 3 | 4009 | 5 | 15000 |

**Talva 1b**. Aliloyvi í "Eysturoy E." 31.12.1995.

| | Aling av smolti | | Aling á sjónum | |
|---|---|---|---|---|
| | Tal | $m^3$ kør | Tal | $m^2$ |
| Gjógv | 1 | 1106 | | |
| Funningsfjørður | 2 | 1169 | 1 | 5000 |
| Oyndarfjørður | 1 | 1649 | 1 | 3000 |
| Fuglafjørður | | | 1 | 2000 |
| Gøtuvík | | | 1 | 3000 |
| Gøtuvík/Skálafjørður | | | 1 | 5000 |
| Lambavík/Skálafjørður | 1 | 245 | 1 | 3000 |
| Eysturoy E. | 5 | 4169 | 6 | 21000 |

**Talva 1c**. Aliloyvi í "Miðøkinum" 31.12.1995.

| | Aling av smolti | | Aling á sjónum | |
|---|---|---|---|---|

| | Tal | $m^3$ kør | Tal | $m^2$ |
|---|---|---|---|---|
| Sundini S. | 2 | 1784 | 2 | 3500 |
| Sundini S./N. | | | 1 | 2000 |
| Kollafjørður | | | 2 | 5000 |
| Nólsoyarfjørður | | | 1 | 3000 |
| Miðøkið | 2 | 1784 | 6 | 13500 |

**Talva 1d**. Aliloyvi "Vestanfyri" 31.12.1995.

| | Aling av smolti | | Aling á sjónum | |
|---|---|---|---|---|
| | Tal | $m^3$ kør | Tal | $m^2$ |
| Hestfjørður | | | 1 | 3000 |
| Norðradalur | 2 | 1092 | | |
| Vestmanna | 3 | nótir[1)] | 2 | 4500 |
| Vestmannasund | 1 | 1105 | | |
| Sørvág | | | 1 | 1500 |
| Vestanfyri | 6 | 2197 | 4 | 9000 |

1) Sí Aling av smolti á vøtnum.

**Talva 1e**. Aliloyvi í "Suðuroy" 31.12.1995.

| | Aling av smolti | | Aling á sjónum | |
|---|---|---|---|---|

| | Tal | $m^3$ kør | Tal | $m^2$ |
|---|---|---|---|---|
| Fámjin | 1 | 521 | | |
| Hov[1)] | 1 | 392 | | |
| Lopransfjørður | | | 1 | 2000 |
| Víkarbyrgi | 1 | 501 | | |
| Suðuroy | 3 | 1414 | 1 | 2000 |
| | | | | |
| Vanlig loyvi íalt | 19 | 13573 | 22 | 60500 |

[1)] Sí Aling av smolti á vøtnum.

**Talva 1f**. Onnur aliloyvi 31.12.1995.

| | Aling av smolti | | Aling á sjónum | |
|---|---|---|---|---|
| | Tal | $m^3$ kør | Tal | $m^2$ |
| Onnur serlig aliloyvi: | | | | |
| Leirvík[1)] | 1 | | | |
| Miðvág[2)] | | | 1 | |
| Skopun/Hestfjørður[2)] | | | 1 | |
| Sundalagið[3)] | | | 1 | |

1) Roynd at nýta vatnið upp í saman at ala smolt í (recirkulering).

2) Loyvi at ala lívfisk.

3) Landføst alistøð.

Alt fleiri smolt og smásíl vórðu latin alarum til í 1991, tá 8.136.000 laksasmolt og 519.000 síl fóru í alinótirnar á sjónum. Síðani hevur nøgdin av smolti, sum er farin á sjógv hvørt árið, verið væl minnið, sum sæst í Talvu 3 á síðu 6.

Í 1995 er talið, sum fór á sjógv komið upp aftur á :

7.759.000 laksasmolt

586.000 síl

Í Talvu 4 á síðu 6 síggja vit hvussu nógvan fisk smoltstøðirnar í hvørjum aliøki sær hava latið alarum á sjónum í 1994 og í 1995.

**Talva 2**. Kør og alibrunnar á smoltstøðunum í 1995.

| Støð | 1x1 | 2x2 | 3m | 5m | 6m | 7m | 8m | 10m | Í alt, $m^3$ |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Siglufelli | | | 53 | | 1 | | | 1 | 501 |
| Áarstøð | 8 | 11 | 46 | | | | | | 354 |
| Vestsmolt | | 56 | 81 | | 10 | | | 8 | 1807 |
| Norðsmolt | | 49 | 66 | 10[1] | | 4[2] | | | 1015 |
| Gjáarsmolt | 12 | 39 | 61 | 23 | | | | | 1106 |
| Hovsá | | 67 | 32 | | | [4] | | | 392 |
| Guttanstøð | | 65 | 44 | 2 | | | | | 521 |
| Laksá | | 40 | 87 | | 7 | | 10[3] | | 1649 |
| Dalásmolt | 16[5] | | 90 | 11 | | | | | 980 |
| Sandá | | 29 | 100 | 14 | | | | | 1123 |
| Sm. í Svínoy | | 45 | 37 | 18 | | | 3 | | 1016 |
| East-Salmon | 20 | 24 | 28 | 16 | | 17 | | | 1186 |
| Fútaklettur | | 26 | 20 | | | | | 9 | 1105 |

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bakkasmolt | | 20 | | | | | 3 | | 245 |
| Fiskaaling | 193 | 46 | 10 | 10 | 5 | | | | 661 |
| Stiðjafjall | | | 16 | | | | | | 112 |
| Í alt | | | | | | | | | 13573 |
| m3 pr kar | 0,5 | 2,5 | 7 | 25 | 30 | 40 | 65 | 100 | |

1) betong brunnar, 25 m$^3$ 2) betongbrunnar, 45 m$^3$

3) betongbrunnar, 70 m$^3$ 4 ) umframt nótir á SEV byrgingum.

5) 1,5 m í diam.

Heystsmolt

Undanfarin ár er so at siga alt laksasmolt farið á sjógv á vári, meginparturin í mai og juni, meðan síl frá byrjan eisini eru latin alarum um heystið. Í dag ber til at fáa maðkapirrur at verða smolt allar árstíðir, og verður hetta fyrst og fremst gjørt við at stýra ljósinum.

Í 1994 royndu fleiri alarar at koyra laksasmolt á sjógv móti vetri, í oktober, november og desember. Tilsamans meira enn 1,5 millión smolt, og sum sæst í Talvu 3 á síðu 6 og Talvu 4 á síðu 6, vaks talið av "heystsmolti" sera nógv 1995.

Ov tíðliga er at gera neyva meting av tali av heystsmolti sum verður til taks í 1996. Førleikin, at ala gott heystsmolt, mennist tó støðugt, og hugsandi er tí, at talið fer at vera á líknandi støði sum í 1995. Álítandi tøl verða tøk aftaná aðru vitjanina á smoltstøðunum í august - september mánaða.

**Talva 3.** Laksasmolt og sjóbúgvin síl sum alistøðirnar í Føroyum hava fingið hvørt árið, síðani fyrstu alararnir byrjaðu í 1980 (1000 fiskar).

| | Vár | | Heyst | | Í alt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ár | Laksur | Síl | Laksur | Síl | Laksur | Síl | Í alt |
| 1980 | | | | | 30 | 157 | 187 |
| 1981 | | | | | 40 | 180 | 220 |
| 1982 | | | | | 85 | 217 | 302 |
| 1983 | | | | | 149 | 329 | 478 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1984 | | | | | 315 | 800 | 1115 |
| 1985 | | | | | 1000 | 800 | 1800 |
| 1986 | | | | | 867 | 647 | 1514 |
| 1887 | | | | | 3200 | 400 | 3600 |
| 1988 | | | | | 4244 | 34 | 4278 |
| 1989 | | | | | 4888 | 50 | 4938 |
| 1990 | | | | | 5752 | 363 | 6115 |
| 1991 | | | | | 8136 | 519 | 8655 |
| 1992 | | | | | 4502 | 204 | 4706 |
| 1993 | | | | | 5150 | 150 | 5300 |
| 1994 | 3937 | 109 | 1593 | 47 | 5530 | 156 | 5686 |
| 1995 | 4116 | 441 | 3643 | 145 | 7759 | 586 | 8345 |
| 1996[1)] | 3937 | 40 | | | | | |

1) Forsøgn gjørd eftir tali av maðkapirrum á smoltstøðunum í januar 1996.

**Talva 4.** Tal av smolti og sjóbúnum sílum, sum smoltstøðirnar í ymisku aliøkjunum hava alt í 1994 og 1995 (1000 fiskar)

**1994**

| | Vár | | Heyst | |
|---|---|---|---|---|
| Øki | Laksur | Síl | Laksur | Síl |
| Norðoyar | 1491 | | 360 | |
| Eysturoy | 1527 | | 337 | 47 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Miðøkið | 591 | 9 | 100 | |
| Vestanfyri | 83 | 100 | 377 | |
| Suðuroy | 245 | | 419 | |
| Í alt | 3937 | 109 | 1593 | 47 |

**1995**

| | Vár | | Heyst | |
|---|---|---|---|---|
| Øki | Laksur | Síl | Laksur | Síl |
| Norðoyar | 1146 | 150 | 857 | |
| Eysturoy | 1384 | | 1087 | |
| Miðøkið | 592 | | 308 | |
| Vestanfyri | 216 | 291 | 703 | 145 |
| Suðuroy | 778 | | 688 | |
| Í alt | 4116 | 441 | 3643 | 145 |

Talið av fiski, sum smoltstøðin hevur latið, verður í Talvu 5 niðanfyri nevnt Bruttotal. Nakað av felli er vanligt í samband við, at fiskurin fer á sjógv, og summar alistøðir hava eisini uppgivið nettotal, ið er talið sum smoltstøðin fær pening fyri, tá fyrsta svinnið er av.

Tølini, sum vit hava fingið hesum viðvíkjandi síggjast í Talvu 5.

**Talva 5.** Úrslit av nøkrum útsetingum í 1994 og 1995 (1000 fiskar)

| Ár | Árstíð | Bruttotal | Nettotal | % av Bruttotali |
|---|---|---|---|---|
| 1994 | Vár | 1632 | 1368 | 83,8 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1994 | Heyst | 563 | 454 | 80,7 |
| 1995 | Vár | 1709 | 1520 | 88,9 |
| 1995 | Heyst | 1424 | 1099 | 77,2 |

Misjavnt er tó, hvussu væl hevur hilnast, serstakliga við at koyra smolt á sjógv um heystið. Í fleiri førum er svinnið væl størri, enn tølini í Talvu 5 vísa.

Endurnýtsla av vatni

Umframt eina minni roynd, sum verður gjørd í Leirvík, varð á tveimum smoltstøðum farið undir at útbyggja serstaka skipan í 1995, sum ger at tað ber til at nýta sama vatnið upp í saman at ala smolt í. Fæst hetta rættiliga at bera til, kan tað fáa sera stóran týdning fyri aling av smolti í Føroyum.

Aling av smolti á vøtnum

Umframt vanliga mátan at ala maðkapirrur í kørum á smoltstøðunum, til tær verða latnar alarum á sjónum sum smolt og sjóbúgvin síl, verður eisini nakað av fiski alt í nótum á vøtnum.

Her kan nevnast, at størsti parturin av smoltinum til alivinnuna í Chile og Skotlandi verður aldur í nótum á vanligum vøtnum. Í Føroyum eru ikki aliloyvi givin á vanligum vøtnum, men 4 loyvi eru givin at ala smolt á SEV byrgingum. Í Talvu 6 á síðu 8 er yvirlit yvir nótirnar á byrgingunum.

Fyrimunir við at ala á vøtnum eru :

- Turkur nervar ikki alingina á vatninum so álvarsliga, sum á eini vanligari smoltstøð.
- Tú fært ikki tær ógvusligu hitabroytingarnar, sum tú fært í áarvatni.
- Íløgan til alistøðina er væl minni
- Alarar á sjónum hava sera góðar royndir av frískum "vatnasmolti".

**Talva 6**. Aling á SEV-byrgingum.

| Alistøð | Tal av nótum | Stødd m | Rúmd pr net $m^3$ | Rúm í alt $m^3$ |
|---|---|---|---|---|
| Fossaaling | 9 | 12x12 | 567 | 5114 |
| | 23 | 12x6 | 283 | 6624 |
| Fiskaaling | 46 | 5x5 | 100 | 4600 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Hovsá | 12 | 5x5 | 62,5 | 750 |
| | 12 | 7x7 | 122,5 | 1470 |
| | 10 | 12Ø | 340 | 3400 |

Vansar eru:

- Elur tú ov nógvan fisk í mun til vatnið, sum rennur ígjøgnum byrgingina, kemur tú sum frá líður at dálka vatnið, sum tú elur í.
- Fært tú sjúku í fiskin, er torført at sleppa frá henni aftur.

Í 1991 varð furunkulosa ávíst á alistøðunum á Lómundaroyri, Frammi á vatni og í Heygadali. Fiskurin varð fyribeindur á øllum hesum støðum í eini roynd at basa sjúkuni.

Byrjað varð aftur at ala Frammi á Vatni í 1993, og í Heygadali í 1994. Á Lómundaroyri er ikki byrjað aftur, og um ársskiftið 1995-96 lá alistøðin á Vatnsnesvatni við ongum fiski í vegna BKD sjúku.

Í Talvu 4 á síðu 6 síggja vit at lutfalsliga lítið tal av smolti er komið úr smoltstøðunum í Suðuroy og Vestanfyri, serstakliga í 1994. Ein av orsøkunum til hetta vóru trupulleikar á alivøtnunum.

## Aling á sjónum.

Fleiri enn 70 aliloyvi vórðu givin á firðum og sundum í áttatiárunum, og í 1989 høvdu 63 alistøðir fisk í sjónum.

Ásannast mátti tó skjótt, at alt ov nógv loyvi vórðu givin, og vinnan fekk óførar trupulleikar at dragast við, orsakaðar av lús og sjúku. Talið av alistøðum er síðani støðugt minkað, og pr. 31.12.1995 var, sum sæst í Talvu 1 á síðu 3 og 4, fiskur í nótunum á 22 vanligum alistøðum. (umframt loyvini at ala lívfisk)

Sambært løgtingslóg nr. 85 frá 19. juni 1990, kunnu aliloyvi ikki verða givin størri enn 30.000 $m^3$ í rúmd, ella 6.000 $m^2$ vídd í vatnskorpuni.

**Talva 7.** Vídd á alibrúkum í $m^2$

| Tal | Vídd, $m^2$ |
|---|---|
| 2 | 1500 |
| 6 | 2000 |
| 1 | 2500 |
| 11 | 3000 |

| | |
|---|---|
| 2 | 5000 |

Tey 22 vanligu aliloyvini høvdu pr. 31.12.1995 samanlagt loyvi til at ala á 60.500 $m^2$ vídd og loyvini vóru býtt í støddir, sum víst í Talvu 7 omanfyri. Aliloyvini eru galdandi í 12 ár, frá tí degi tey eru útskrivaði.

Skiftisøki

Lús og sjúka fáa ikki sama festi, og gera væl minni um seg, um hvør alistøðin hevur fleiri øki tøk at ala á. Teir ymisku árgangirnir kunnu tá alast hvør sær, og hvørt øki kan síðani fáa "hvíld" so langa tíð, sum til ber, frá tí fiskurin er tikin, og til næsti árgangur verður fluttur á støðina.

Flestu laksaalarar aðrastaðni skipa alingina við skiftisøkjum á hendan hátt. Í Føroyum vóru alt ov nógvar alistøðir til, at tað bar til at ala eftir tílíkari ætlan.

Í summum førum hevur Landsdjóralæknin tó skipað fyri fyribils skiftisøkjum vegna sjúku.

Í 1995 høvdu alistøðir fyribils skiftisøki á Haraldssundi N, Tangafirði, Funningsfirði, Sundunum N., Kalbaksfirði, Fuglafirði, Skálafirði, Trongisvágsfirði og Oyndarfirði

Hvør alari kundi, sum vera man, í dag ynskt sær fleiri firðir at arbeitt á. Sum sæst í Talvu 1 á síðu 3 og 4, er tó nú stórt sæð bert ein alistøð eftir á hvørjum fjørði, og tá ber í vissan mun til hjá flestu alarum at skipa alingina við fleiri økjum innan hesar karmar. Alarin avger tá sjálvur, um fjørðurin verður yvirskipaður.

Bert í einstøkum førum hevur sami alari loyvi at ala á tveimum firðum, ella tvey aliloyvi arbeiða saman soleiðis, at árgangirnir kunnu alast á hvør sínum fjørði.

Tvey aliloyvi eru framvegis á Kollafirði, á Gøtuvík, og inni á Vestmanna. Á Skálafjørðinum eru tvey loyvi, sum tó bæði samstundis hava loyvi ávíkavíst á Gøtu- og Lambavík. Sunnanfyri Streymin í Sundunum eru 3 loyvi, umframt landføstu støðina.

Í Talvu 8 á síðu 10 finna vit talið av laksasmolti og sjóbúnum sílum, sum í 1995 er farið í nótirnar á alistøðunum í hvørjum aliøki sær.

Sum sæst er 2,8 milliónir fiskar farnir á firðirnar eystantil á Eysturoy, 2,3 milliónir í Norðoyggjum og 2,3 milliónir í Miðøkinum. Hinvegin er bert 0,4 millión sett út í Suðuroy og 0,5 millión Vestanfyri.

**Talva 8**. Talið av laksasmolti og sjóbúnum sílum, sum í 1995 er farið í nótirnar á alistøðunum í hvørjum aliøki sær. 1000 fiskar.

| | Vár | | Heyst | | 1995 |
|---|---|---|---|---|---|
| Øki | Laksur | Síl | Laksur | Síl | Íalt |
| Norðoyar | 1205 | 10 | 1119 | | 2334 |
| Eysturoy E. | 1310 | 40 | 1452 | 24 | 2826 |
| Miðøkið | 1317 | 237 | 669 | 61 | 2284 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | 130 | 54 | 222 | | 406 |
| Vestanfyri | 155 | 100 | 183 | 60 | 498 |
| Í alt | 4117 | 441 | 3645 | 145 | 8348 |

Flestu alistøðir koyra, sum vera man, nógv fleiri smolt á sjógv hvørt árið nú, enn vanligt var undanfarin ár. Í 1995 koyrdu 19 alistøðir í meðal 440.000 fiskar á sjógv, og av hesum koyrdu 4 støðir úr 800.000 upp í 900.000 fiskar á sjógv í part.

At so lítið av fiski er sett út Vestanfyri og í Suðuroy í 1995, er í stóran mun orsakað av, at tað ikki fyribils verður alt á fleiri firðum vegna B.K.D. sjúku.

Í Talvu 1 á síðu 3 og 4 er tal sett fyri hvussu nógvar $m^2$ hvør støðin hevur loyvi at ala á, t.v.s. økið í vatnskorpuni av øllum nótunum tilsamans. Í 1991 vórðu aliloyvini avmarkaði í $m^3$, og loyvi vóru tá til íalt 652.500 $m^3$ á øllum alistøðum tilsamans. Ein kanning, sum varð gjørd, vísti tó at veruliga rúmdin, sum alt var í, var 1.222.362 $m^3$, ella nærum tað dupulta av loyvdu rúmdini.

Við atliti til stóru og alsamt vaksandi kappingina úr hinum londunum, sum ala laks er umráðandi, at alarin ikki hevur ov stutt boð. Vinnan má hava rúmlig viðurskifti at arbeiða undir, fyri at kunna laga seg til nógv broyttu viðurskiftini.

Nú stórt sæð bert ein alistøð er á hvørjum fjørði, vildi verið rímiligt at laga treytirnar í loyvinum viðvíkjandi stødd á alistøðum, so tær samsvara betur við broyttu umstøðurnar, og veruleikan í dag.

<u>Flutningur úr einum aliøki í annað</u>

Talið av smolti, sum kan alast á smoltstøðunum í teimum ymisku aliøkjunum, svarar ikki í øllum førum til tørvin hjá alistøðunum í sama øki.

Í talvu 9 á síðu 11 eru í fremsta teigi allar alistøðir á sjónum samlaðar undir tí økisnavni, sum tær hoyra til. Síðani er kannað eftir, hvaðani tey ymisku aliøkini hava fingið smolt.

Vit síggja, at smolt úr øllum aliøkjum verða send til alistøðir um alt landið. Hetta kann vera ein av orsøkunum til, at ávísar sjúkur, sera skjótt eftir at tær eru ávístar á fyrsta sinni, hava spjatt seg um alt landið.

**Talva 9**. Hvaðani fingu ymisku aliøkini smolt í 1995 ? 1000 fiskar.

| Smolt til | Smolt úr | Vár | | Heyst | |
|---|---|---|---|---|---|
| aliøki | aliøki | Laksur | Síl | Laksur | Síl |
| Norðoyar | Norðoyum | 342 | | 487 | |
| | Eysturoy E. | 567 | | 405 | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Miðøki | 14 | 10 | | |
| | Vestanfyri | | | | |
| | Suðuroy | 282 | | 227 | |
| | | | | | |
| Eysturoy E. | Norðoyum | 152 | | | |
| | Eysturoy E. | 519 | | 536 | |
| | Miðøki | 170 | | | |
| | Vestanfyri | 53 | 40 | 594 | 24 |
| | Suðuroy | 416 | | 326 | |
| | | | | | |
| Miðøki | Norðoyum | 252 | 50 | 370 | |
| | Eysturoy E. | 89 | | | |
| | Miðøki | 405 | | 308 | |
| | Vestanfyri | 433 | 187 | 113 | 61 |
| | Suðuroy | 290 | | 61 | |
| | | | | | |
| Vestanfyri | Norðoyum | | | | |
| | Eysturoy E. | | | | |
| | Miðøki | 3 | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Vestanfyri | | 100 | | 60 |
| | Suðuroy | | | | |
| | | | | | |
| Suðuroy | Norðoyum | | | | |
| | Eysturoy E. | | | | |
| | Miðøki | | | | |
| | Vestanfyri | 130 | 54 | | |
| | Suðuroy | | | 222 | |

Lívfiskur, rogn og yngul hava, sum vera man, sama vanda við sær. Somuleiðis flutningur millum økini við brunnbáti ella bili, tá tikið verður.

## Heilsustøða.

Tá fyrstu spurnarbløðini til alarar vórðu gjørd, vórðu í samráð við Landsdjóralæknan, eisini settir nakrir spurningar á bløðini um sjúkur á alistøðunum.

Tað, sum her verður sagt um, hvussu herviligastu fiskasjúkurnar hava háttað sær, nú nakað er fráliðið, síðani tær fóru at gera um seg, er lutvís tikið úr spurnarbløðunum, men mest eftir munnligum upplýsingum frá fiskasjúkudjóralæknunum.

Hitrasjúkan, sum fór at gera um seg í 1987, hevur bert í einstøkum førum volt alivinnuni álvarslig tap síðani gott koppingarevni kom á marknaðin.

B.K.D. varð staðfest á fyrsta sinni í Føroyum á vári 1990, hevur síðani spjatt seg til øll aliøki, og bert einstakar alistøðir eru slopnar undan sjúkuni seinastu árini.

Missurin hevur verið herviligur hjá mongum, men í seinastuni kundi sæð út, sum B.K.D. sjúkan er farin at gera nakað minni um seg, har hon rakar ? B.K.D. er bert ávíst á fáum smoltstøðum, men mynstrið, sum sjúkan vísir á sjónum bendir á, at hon er torfør at ávísa í smáfiski á smoltstøðunum. (uppl. frá Ole Jurgens)

Furunkulosa varð ávíst í 1991, fór skjótt um alt landið, og voldi sera stóran miss á mongum alistøðum. Á teimum smoltstøðum, sum fyrst fingu furunkulosu, varð allur fiskurin á støðini fyribeindur í eini roynd at avmarka sjúkuna. Nú alt smolt hevur verið koppsett, er bøtt avgerandi um missin av furunkulosu á sjónum.

Á smoltstøðunum er furunkulosan hinvegin vorðin sera torfør at fáast við, serstakliga av tí, at bakterian, sum ger um seg hjá okkum, er vorðin mótstøðufør móti meginpartinum av tí heilivági, sum er til taks at basa sjúkuni við.

Furunkulosan hevur gjørt meira og minni um seg á so gott sum øllum smoltstøðunum. Summar smoltstøðir eru slopnar av aftur við furunkulosuna, men hon sær út til at hava lyndi at vitja aftur. Nakrar smoltstøðir hava verið sera meint raktar av furunkulosu.

Hjartaklovningur fór av álvara at gera um seg í 1992, og er framvegis heilt álvarsligur trupulleiki á mongum alistøðum á sjónum. Eingir møguleikar eru at viðgera fyri hesa sjúku.

Laksalúsin hevur gjørt minni um seg, nú alistøðirnar eru færri, og fleiri evni eru at viðgera við. Smærra lúsaslagið ella "seiðalúsin" hevur tó gjørt meira um seg seinnu árini.

## Umrøða.

Alifiskur - veiða av toski og hýsu í 1991 og 1992

So at siga allur alifiskurin verður útfluttur, og í 1991 og 1992 svaraði nøgdin, sum varð flutt út, til umleið 18.000 tons av alifiski, roknað um til runda vekt.

Í nøgd er hetta meira, enn vit veiddu av toski og hýsu tilsamans undir Føroyum, hesi bæði stak vánaligu fiskiár.

Veiða undan Føroyum:

| Ár | Toskur<br>tons | Hýsa<br>tons | Tilsamans<br>tons |
|---|---|---|---|
| í 1991 | 9.388 | 8.599 | 17.987 |
| í 1992 | 6.539 | 5.048 | 11.578 |

Virðið á útflutta alifiskinum

Veiðu- og útflutningstølini eru úr "Árbók fyri Føroyar 1995", og her sæst eisini, at úr Føroyum varð flutt út fyri tilsamans 2,4 milliardir kr. í 1992. Umleið 25% av hesum virði var alifiskur.

Í 1994 var útflutningur Føroya í virði góðar 2 mia. kr. Virðið av útflutta alifiskinum var hetta ár 404 milliónir kr., ella júst 20% av samlaða útflutninginum.

Fyribils uppgerð vísir at í 1995 hava vit flutt út 7.364 tons av alifiski, flak, royktur fiskur v.m. íroknað. Hetta svarar til 9.000 tons av alifiski roknað um til runda vekt, ella bert helvtina av nøgdini, sum varð flutt út í 1991 og 1992. Samlaða útflutningsvirðið Føroya í 1995 var góðar 1,9 mia. kr., meðan virðið av útflutta alifiskinum var 233 milliónir kr. ella 12% av samlaða útflutninginum.

Útflutningur av skipum er ikki roknaður við her.

Laksaaling í Føroyum í mun til onnur lond.

Royndir at ala ælabogasíl vórðu á fyrsta sinni gjørdar í Suðuroy í 50.árunum, og síðani aftur frá 1967 í Eysturoy.

Almenna partafelagið Fiskaaling p/f helt fram við royndunum at ala síl og laks øll sjeytiárini, og lat í 1980 smásíl og laksasmolt til 6 privatar alistøðir, sum tá fóru undir at ala á firðum og sundum.

Millum lond, sum ala laks, lógu Føroyar á triðja plássi, aftan á Noregi og Skotlandi líka til 1992, tá Chile fór fram um í nøgd. Í 1994 fór Canada fram um okkum, og í 1995 bæði USA og Írland. Í 1995 liggja Føroyar sostatt á sjeynda plássi millum hesi laksalond, framman fyri Tasmaniu (Australia) og Ísland (Talva 10 ).

**Talva 10.** Aling av atlantshavs-laksi. (1000 tons rund vekt)

| Ár | Nor | Skot | Irl | Før | Ísl | Can | US | Chil | Aus | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ‘78 | 3,5 | | | | | | | | | 3,5 |
| ‘80 | 4,1 | 0,6 | 0,02 | | | | | | | 4,7 |
| ‘82 | 10,5 | 2,2 | 0,1 | 0,07 | | | | | | 12,9 |
| ‘84 | 22,2 | 3,9 | 0,4 | 0,1 | | | | | | 26,6 |
| ‘86 | 46,5 | 9,7 | 1,3 | 1,4 | 0,02 | | | | | 58,9 |
| ‘88 | 80 | 18 | 5 | 4 | 1 | 3 | 1 | 1 | 2 | 115 |
| ‘90 | 165 | 33 | 8 | 12 | 2 | 9 | 3 | 10 | 3 | 245 |
| ‘92 | 141 | 36 | 10 | 18 | 3 | 17 | 10 | 24 | 3 | 262 |
| ‘94 | 207 | 64 | 14 | 15 | 3 | 30 | 14 | 39 | 5 | 391 |
| ‘95 | 249 | 72 | 12 | 9 | 3 | 32 | 17 | 62 | 6 | 462 |

Prísur á alifiski og íløgustuðul.

Óføri vøksturin í alivinnuni í flestu av hinum londunum, sum ala laks, hevur elvt til, at støðugt minni hevur fingist fyri alifiskin seinastu árini. "Stórkapitalurin" rekur í dag alt meira av vinnuni í hesum londum.

Í eini roynd at bøta um støðuna í føroysku alivinnuni orsakað av hesum, og geva henni møguleika at konsolidera seg, hevur eftir løgtingslóg nr. 73 frá 2. apríl um íløgustuðul til alivinnuna, verið latin alarum á sjónum íløgustuðul í 1993, 1994 og í 1995.

Stuðulin var avmarkaður til hesi trý ár. Upp til 5 mill. smolt kundu fáa stuðul hvørt árið, og 5 kr. vórðu latnar fyri hvønn fisk, sum fór á sjógv.

Nakað av vertikalari integrering er farin fram í føroysku alivinnuni seinnu árini. Fleiri alistøðir á sjónum og

smoltstøðir hava sama eigara, og samstarv er millum alistøðir.